## NØVN Í VIKUNI

# Poul Johannes Johansen 80 ár



Mikudagin 26. februar verður Poul Johannes Johansen fyrrverandi sjómansskúlastjóri í Havn 80 ár. Poul Johannes er føddur og uppvaksin á Strondum. Hann fór til skips sum 16 ára gamal og tók prógv sum fiskiskipari í 1946. Á vári 1950 tók hann stýrimansprógv í Havn, hetta var fyrsta próvtøkan, eftir at skúlin var yvirtikin í 1949. Um heysti 1950 tók hann skipsføraraprógv í Keypmannahavn og telegrafistprógv í 1951. Eftir tað sigldi hann sum stýrimaður og telegrafist hjá DFDS til 1954, tá hann fór at útbúgva seg til sjómansskúlalærara. Hann var lærari á Fanø Navigationsskole frá 1957 til 1962, tá familjan flutti heima aftur til Føroya. Poul Johannes var settur sum lærari á Føroya Sjómansskúla 1. august 1962. 1. oktober 1971 tók hann við sum stjóri á Føroya Sjómansskúla, tá táverandi skúlastjórin, Dánjal J. Joensen, legði frá sær fyri aldur. Poul Johannes fór frá sum skúlastjóri í 1993, tá hann var 70 ára gamal. Síðan hevur hann gjørt tað hann hevur havt hug til saman við konu, børnum og abbabørnum. Hóast sjónin er farin at bila tey seinnu árini, forðar tað honum ikki í at spæla bridge á telduni og annars at seta seg inn í tað, ein telda kann brúkast til. Poul Johannes fylgir væl við tí sum fyriferst í samfelagnum. Hann hevur verið limur í Lions Club í Havn síðan 1966, tá felagsskapurin varð stovnaður. Hann brúkar eisini sína vitan innan sína yrkisgrein, við tað at hann hvørt ár roknar út streymtalvur til Álmanakkan. Í 1951 giftist Poul Johannes við Katrinu, født Poulsen, av Strondum og fingu trý børn, sonin Kristian og døturnar Maibritt og Maluna.

Føðingardagurin verður hildin mikudagin 26. februar frá kl. 10-16 við móttøku í heiminum á Haraldstrøð 1 í Havn.



# Føroya Ríðingarfelag 60 ár

Týsdagin, 25. februar, varð Føroya Ríðingarfelag 60 ár. Felagið heyði okkurt til børnini í Útibarnagarðinum í Havnardali í gjár í sambandi við føðingardagin. Formaður í Føroya Ríðingarfelag er Hans Vilhelm Lützen.

# Jógvan E. Ósá 60 ár



Leygardagin, 22. februar, fylti Jógvan E. Ósá løgreglumaður í Runavík 60 ár. Jógvan er føddur og uppvaksin í Klaksvík. Hann var sjómaður og arbeiðsmaður, áðrenn hann tann 15. oktober í 1968 kom inn á politiskúlan í Danmark. Hann arbeiddi sum løgreglumaður í Havn frá 1970-72. Í 1972 flutti hann til Klaksvíkar, har hann arbeiddi sum løgreglumaður til 1989. Frá 1989 til 1994 var hann sýslumaður í Sandoynni. Síðan 1994 hevur hann arbeitt sum varaleiðari á Politistøðini í Runavík. Jógvan hevur eisini luttikið í sjónleiki í ymiskum sjónleikarafeløgum í landinum.

# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran ...**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:............................................................
Bústaður:........................................................
Bygd/býur:...................................Tel:..................
Evt. arbeiðspláss:...............................................

Merkisdagurin er: ...............................................

Innsendari:..................................Tel:..................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo

# All That Rain leggur til brots aftur

**Væl umtókti rockbólkurin fer nú aftur at spæla til dans og konsertir. Nýggjur sangari er komin við í bólkin, og teir eru fullir av orku, nú teir leggja til brots aftur**



1. mars fer All That Rain at spæla aftur alment, og tað verður við einum nýggjum sangara. Pól Arni Holm, sum var sangari í Týr, er farin upp í All That Rain, og harvið eru teir nú fýra tónleikarar í bólkinum.

Fyrsta framførslan við Pól Arna verður nú leygarkvøldið, tá ið All That Rain fer at spæla til árliga grýludansin í ítróttarhøllini á Kambsdali.

– Pól Arni passar óvæntað væl til bólkin. Hann er sera nærlagdur og seriøsur, og hann fer at geva bólkinum nakað heilt nýtt. Hann kann syngja alt frá vøkrum balladum til harðan rock. Vit eru bergtiknir av honum og hava ongantíð áður verið so spentur upp á bólkin, sum vit eru nú.

Soleiðis siga hinir tríggir tónleikararnir, sum eru við í All That Rain um nýggja sangaran. Teir eru Hans Ravnsfjall, sum spælir gittar og syngur, Henning Nicodemussen, sum spælir trummur, og Jens Tummas Ness, sum spælir bass.

### Nýtt lív

All That Rain er kendur sum ein vælspælandi bólkur, sum fevnir breitt, tá ið talan er um tónleik. Teir spæla bæði sangir hjá sær sjálvum og sangir hjá øðrum, og nú nýtt lív er komin í bólkin, eru teir farnir at hugsa um at spæla eina nýggja fløgu inn.

Men fyri fyrst verður talan um framførslur til dans og konserttiltøk kring landið.

1. mars spæla teir á Kambsdali og 8. mars eru teir í Royn-høllini í Hvalba.

Tað er rættiligur gravgangur eftir at fáa All That Rain at spæla, og tí verður ivaleyst møguleiki at hoyra teir til onnur tiltøk kring landið seinni.

Tað ber til at frætta meira um bólkin og komandi tiltøk á heimasíðuni www.allthatrain.com

